# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Minningarorð um okkara kæra starvsfelaga Rannvá Henriksen

f. 17. apríl 1978 – d. 1. januar 2010

Nýggja árið byrjaði ikki væl og var ikki gamalt, tá ið vit fingu at vita, at Rannvá ikki var hjá okkum meira. Væl vistu vit, at Rannvá var sera sjúk, men vónin var altíð har. Ongantíð skulu vit aftur hoyra hennara smittandi látur og síggja hennara vakra smíl.

Rannvá byrjaði at arbeiða sum laborantur á Heilsufrøðiligu starvsstovuni á heysti 2004. Frá fyrsta degi passaði hon væl inn á Starvsstovuni. Við sínum nærlagni, hjálpsemi og dámliga lyndi var hon ein sera góður starvsfelagi, og hava vit verið ómetaliga glað fyri at hava arbeitt saman við henni og fingið høvið at kenna hana.

Fyri trimum árum síðani gjørdist Rannvá sjúk. Hóast hetta læt Rannvá við sínum opinleika og heimasíðu okkum vera ein partur av sínum lívi. Her kundu vit fylgja við, hvussu støðan var, og lætt var tað tí hjá okkum at møta og tosa við hana. Hóast langar sjúkrameldingar var Rannvá ofta hjá okkum. Av og á hevði hon fitta sonin Jógvan Jón við. Vit sakna at hoyra Rannvá siga frá stuttligum søgum, um hvat Jógvan Jón hevur sagt og gjørt.

Rannvá var sera positiv av lyndi, og hon minti okkum á at gleðast um hvønn dag. Á heimasíðuni hevði Rannvá nøkur sigandi orð, sum hon royndi at liva eftir:

*"Gud gev mær sálarfrið til at góðtaka tað,*
*ið eg ikki kann broyta.*
*Mót til at broyta tað, eg kann.*
*Og skil til at kenna mun."*

Sorgin og saknurin eftir Rannvá eru sera stór, og vísir tað bara, hvussu stóran týdning hon hevði fyri okkum her á stovninum.

Nógvar tungar løtur hava verið á vegnum hjá Rannvá, men við síni óalmindiliga góðu barlast, manninum Kristian Oskari, soni og familju annars, kláraði hon sína støðu sera væl.

Okkara djúpastu samkenslu við tykkum, sum eftir sita: Kristian Oskar, Jógvan Jón, familja og vinir.

**Starvsfelagirnir**
**á Heilsufrøðiligu starvsstovuni**



## Merkisdagar

### 70 ára føðingardagur

Leygardagin 24. apríl verður Solveig Nolsøe Johansen 70 ár. Opið hús verður leygardagin 24. apríl í Jómsborg frá kl. 14 til kl 18. Øll eru vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Tann 19. apríl fyllir Merry Bertholdsen í Vági, 80 ár. Tey sum vilja hátíðarhalda dagin saman við henni, eru vælkomin í Billiardhúsið, har dagurin verður hildin leygarkvøldið 24. apríl kl. 19

### 80 ára føðingardagur

Mikudagin 21. apríl fyllir Sonja Egholm Danielsen 80 ár. Tey sum vilja heilsa uppá Sonju eru vælkomin á Traðaveg 7, mikudagin 21. apríl millum kl. 14 og 17.

### Brúdleyp

Leygardagin 24. apríl giftast Kristianna S. Lamhauge, Streymnes og Johnny S. Johannesen, av Oyrarbakka. Vígslan verður kl. 14 í Hvalvíkar kirkju. Veitslan fyri innbodnum, verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 18.

Leygardagin 1. mai giftast May-Britt Jacobsen og Henning Holm, Vágur. Vígslan verður í Vágs kirkju kl. 15. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í VB húsinum kl. 18.30.

Leygardagin 1. mai giftast Linda Kjeld, Tórshavn og Jákup Eli Joensen, Oyrabakki. Vígslan verður kl. 12 í Havnar Kirkju. Døgurðin verður saman við familjuni. Síðan verður veistlan í Bygdarhúsinum í Kollafirði kl. 19, og familja og vinir eru hjartaliga vælkomin.



Leygardagin 1. mai giftast Dania Berthelsen og Svein Thomsen, Strendur. Vígslan verður í Sjóvar kirkju kl. 11. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 15. Frá kl. 19 verður opið hús í Bygdahúsinum á Strondum, har øll er hjartaliga vælkomin at gleðast saman við brúðarparinum. Vinarliga Dania & Svein.

# Kvinnustevna á Eiði

Í ár verður kvinnustevnan hjá Frelsunarherinum á Hotel Eiði frá 23. til 25. apríl.

Vitjan verður av leiðarunum fyri Føroyar, Ísland og Noreg kommandørunum Carl og Gudrun Lydholm, sum koma at leiða og tala á stevnuni.

Stevnan verður sett fríggjakvøldið kl.20. Leygardagin verður bíbliutími, og eisini kemur borgarstjórin á Eiði at siga frá um bygdina.

Um kvøldið kl. 20 er alment møti í missiónshúsinum Karmel, tá er vitjan úr Havn av hornorkestri og streingjakóri. Umframt kommandør Lydholm, sum kemur at tala, koma eisini onnur at luttaka við sangi og vitnisburði. Sunnudagin kl. 11 er seinasta møti á stevnuni.





*Gudrun og Carl Lydholm*